

*John Yiannakis skuldi vera við á vanlukkuferðini hjá Manchester United fyri 47 árum síðani. Óttin fyri at flúgva fekk hann tó at setast aftur, og ístaðin mátti hann síggja fleiri av vinmonnunum sínum á liðnum lata lív*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

frá vanlukkuni, og skjótt var hann farin í holt við at byggja sær eitt nýtt stórlið upp. Eitt lið, sum varð eyknevnt »the Busby Babes«, og sum saman við vanlukkuni gjørdist sjálv ímyndin av Manchester United. Ein ímynd, sum líka síðani hevur virkað við til at gera felagið til eitt tað best umtókta í heiminum.

Og eisini í hesum arbeiðinum átti John sín lítla lut. Hann var framvegis ofta saman við fleiri av spælarunum í felagnum. Eisini eftir at hann sjálvur var hildin uppat at spæla fótbólt á høgum stigi.

– Eins og í dag, so høvdu yrkisspælarar nógva frítíð, og hon varð nýtt ymsastaðni. Ikki minst við ríðibanarnar, har vit javnan veddaðu upp á hestar. Vónin var sjálvandi, at vit á tann hátt kundu vinna nakað av peningi afturat teimum upphæddum, sum vórðu vunnar í felagnum. Eg kom tá eisini at kenna alt fleiri persónar í felagnum. Eisini fylgdist eg nógv við Sandy Busby, ið var sonur Matt, og Don Gibson, ið var versonur hansara. So eg varð so líðandi biðin um at gera tænastur av ymsum slag.

- Onkra tíð var eg bilførari fyri George Best, men ein av heilt føstu uppgávunum var at koyra Brian Kidd til venjing. Hann hevði hvørki koyrikort ella bil, so onkur mátti taka sær av tí. Tað var ikki sum í dag, har spælarar kunnu keypa stórt sæð tað, sum teimum lystir. Tá var lønin sum sagt hesi 20 pundini um vikuna, har hon í dag er kanska 20.0000! Og upphæddirnar, sum spælarar í dag verða keyptir fyri, orki eg slettis ikki at hugsa um. Tað er nokk eisini størsti munurin í dag, tí nú er fokus í nógv størri mun á spælararnar, har tað fyrr vóru feløgini, sum hugsað varð um, staðfestir John hugsunarsamur.

Til kunningar kann nevnast, at Brian Kidd seinni var maðurin, sum bert 19 ára gamal skeyt eitt av málunum hjá Manchester United í 4-1 sigrinum á Benfica í Europa Cup-finaluni í 1968. Og sum seinni var hjálparvenjari hjá Alex Ferguson, tá hesin í 1993 var venjarin, sum førdi fyrsta meistaraheitið í 26 ár til Old Trafford.

Og saman við restini av felagnum kundi John eisini frøast um, at Manchester United síðani reisti seg aftur. Somikið væl, at liðið bara 10 ár eftir vanlukkuna stóð ovast á pallinum, tá liðið vann eina minniríka finalu móti Benfica.

## Fekk sítt kall

So við og við gjørdist talan eisini um aðrar uppgávur. Eitt langt skifti var John við í ymsum nevndum í enska fótbóltssambandinum, og serliga var tað í dómaranevndini, at hann hevði eitt drúgt virki.

– Eg tosaði ofta um at venda heim til Kypros, men tey flentu altíð at mær. Tey søgdu, at eg hevði tað alt ov gott í Onglandi.

- Eina ferð tók eg meg so saman, og fór at ferðast heim. Eg hevði ikki verið her í fleiri ár, og eg var skelkaður um, hvussu lítlan framburð fótbólturin hevði havt. Snøgt sagt, so var at kalla einki hent, og eg kendi veruliga á mær, at hetta var eitt kall. Eg gjørdi bart. Ringdi til Onglands og segði mínum samstarvsfeløgum, at eg kom ikki aftur. Tørvur var á mær her á Kypros, og so varð eg verandi.

Og síðani hevur tað verið fyri kypriotiskan fótbólt, at hjarta hansara hevur bankað. Eitt arbeiði, sum hann enn heldur er langt ífrá liðugt.

– Eg virkaði fyrst sum venjari. Men tað var ikki nóg mikið. Her hava feløgini ikki ráð til at hava hópin av hjálparfólki, so eg nam mær eisini útbúgving sum fysioterapeutur. Hartil hevur tað ofta verið heitt á mína hjálp, tá ymisk fyrisitingarlig viðurskifti skuldu loysast, so gjøgnum árini hava uppgávurnar verið bæði nógvar og ymiskar.

– Og tað hevur eisini verið sum venjari, at eg havi trivist best. Kanska hava knøini argað nakað seinnu árini, men eg kann framvegis læra hasar ungu menninar okkurt. Ikki minst, at teir skulu vera eyðmjúkur mótvegis uppgávuni. Tað er tað, sum er felagsnevnari fyri at kalla allar góðar spælarar. Ikki minst teir, sum í sínari tíð spældu undir Matt Busby.

Men tú gjørdist ongantíð landsliðsvenjari?

– Nei. Tað hevur tíverri víst seg, at kypriotar heldur vilja hava onkran útlending at standa á odda fyri liðnum. Tað kann sjálvandi vera gott við íblástri, men tað átti ikki at verið nakað krav, at venjarin er útlendskur. Men soleiðis hevur tað bara oftani verið, heldur hann.

Men hvar stendur kypriotiskur fótbóltur í dag?

- Vit hava enn langt eftir á mál. Ikki minst í taktiska partinum av spælinum. Hugdi tú at dystinum í gjár, so er helst eingin ivi um, at vit hava betri spælarar enn tit. Men tá tosi eg um einstaklingar. Sum lið vóru tit eins góðir, og tað er her, at vit framvegis hava heilt nógv at læra. Tað hjálpir lítið, at áskoðararnir støðugt klappa at einum spælara, sum dugir ófatuliga væl at dribla, um hesin samstundis er atvoldin til, at spælið mest sum hvørja ferð steðgar upp. Tað at taka heildina fram um undirhaldið er enn nakað, sum okkara skulu læra.